FAROE
LAW

Faroe Law bjóðar heimligar og altjóða loysnir

*Tosið við:*

**Eyðfinn Jacobsen**
**advokat**

**Jens Wang**
**advokatfulltrúa**

Tróndargøta 19
P.O.Box 1218
FI-110 Tórshavn
tel 359 900 - fax 359 901
mobil 219 902 - 219 903
faroe-law@faroe-law.fo

www.faroe-law.fo

Sosialurin

# Handilslærlingur

Søkt verður eftir handilslærlingi til HVS-handilin Hiti at byrja tann 20. mars 2006.

**Vit kunnu bjóða:**
Eitt spennandi starv, har viðkomandi kemur at royna seg innan vørukeyp, ger av tilboðum og sum heild vera ein partur av arbeiðinum at halda handilshølini snotulig. Gjøgnum lærutíðina kemur lærlingurin at nema sær eina breiða vitan um ventilatión, hitaanlegg og sanitet.

**Uppgávurnar fevna um:**
- Avgreiðslu av kundum
- Røkt av handlinum
- Bílegging av vøru
- Annað fyrifallandi arbeiði

**Førleikakrøv**
Lokið FHS- ella HH-prógv.

Umsókn við viðkomandi upplýsingum skal sendast til:

**Sp/f Hiti**
Stoffalág 33
Postsmoga 3285
110 Tórshavn

Umsóknin eigur at vera okkum í hendi í seinasta lagi 10. mars 2006.

Meira fæst at vita við at tosa við Áka Mortensen á tlf. 315008.

*Hiti er ein nýggj HVS-fyritøka, sum lat upp tann 4. mai 2005. Í dag starvast 6 fólk á fyritøkuni.*

**Heimarøktin og Serforsorgin**
*Serstovnadeildin*

# Pedagogur

## Kontaktpersónur

Undir Almanna- og Heilsumálaráðnum og stovnum undir tí, við tænastu fyribils í eini verkætlan undir Heimarøktini og Serforsorgini, Serstovnadeildini verður søkt eftir pedagogi til setan 01.04.2006, ella eftir nærri avtalu.

Talan er um fulltíðarstarv, og arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna.

Arbeiðstíðirnar eru skiftandi, og roknast skal við morgun-, kvøld-, náttar- og vikuskiftisarbeiði.

**Starvið**
Talan er um eina verkætlan, har ein persónur fyrst í 20'unum, sum hevur autismu, skal flyta heimanífrá, og læra at skipa sín gerandisdag í egnari íbúð og við føstum arbeiði so sjálvstøðugt sum gjørligt. Í verkætlanini koma ætlandi at starvast 4 fólk í einum toymi.

Tín uppgáva verður, umframt at virkað sum stuðul í gerandisdegnum, at verða kontaktpersónur í verkætlanini. Hetta inniber, at tú verður bindiliðið í samskiftinum ímillum starvsfólkini í toyminum, og í samskiftinum ímillum toymi, avvarðarandi, leiðslu og brúkaran.

Talan er ikki um eitt leiðarastarv. Toymið skal í felag leggja til rættis og skipað gerandisdagin bæði praktiskt og fakliga. Øll størvini í verkætlanini vera tó bygnaðarliga skipað undir eini av verandi stovnsleiðslum undir Serstovnadeildini.

**Førleikakrøv**
Tú skalt hava útbúgving sum pedagogur ella aðra líknandi útbúgving, sum bæði verkliga og ástøðiliga er minst á hædd við hesa. Ynskiligt er at tú hevur ávísa servitan um autismu, men hetta er ikki nakað krav.

Tú mást vera sálarliga væl fyri og kunna taka eina professionella støðu og halda fast við hesa. Tú mást hava góð eygleiðingarevnir, og duga væl at skipa og brúka tínar eygleiðingar í sambandi við menning av tilboðnum. Tú mást duga væl at samskifta og hava evni til at motivera fólk uttan um teg.

Annars vænta vit at tú ert sinnað/ur støðugt at luttaka í relevantari eftirútbúgving, og annars hevur áhuga í støðugt at dagføra tína fakligheit, so hon allatíðina samsvarar við nýggjastu vitanina innan økið. Vit bjóða í hesum sambandi fakliga supervisión og fakliga ráðgeving viðvíkjandi autismu.

**Løn- og setanartreytir:**
Starvið er tænastumannastarv, sett sambært avtalu millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið á lønarstigi 24, 25, 27, 28 og 30 til 33.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Jóanes N. Dalsgaard, deildarleiðara á tlf. 304020

**Umsókn:**
Umsóknir við hjáløgdum próvskjølum, viðmælum og C.V. skulu sendast til:

**Heimarøktin og Serforsorgin**
Serstovnadeildin
Eirargarður 2, 2. hædd
FO 100 Tórshavn

**Umsóknarfreistin er mikudagin 15.03.2006.**

**LEIGA**
**AMBOÐ**
**&**
**MASKINUR**

**Kaj Andreasen & Co**
BREKKUTÚN 7 · 188 HOYVÍK
TEL 31 56 00



**VW Passat tdi 115 hk**
Árg. 2000. Km: 109.000
El-sóltak+rútar+spegl. Koyritelda. Esp.
6 gear. Mp3 spælara. Aircondition+klima
Sera vælhildin. 17" Sportfelgur v/góðum summardekkum + nýggj kavadekk. Praktiskur og rúmligur. Øll oljuskift + eftirlit hildin

**Prísur 165.000 ,-**

**Tlf. 506260**

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 2732,** Sp/f SPEKT, statsaut. revisorar, 100 Tórshavn.
**Stjórn:** Farin frá sum stjóri: Súni Schwartz Jacobsen, Norðstíggjur 12, 160 Argir

Skráseting Føroya
tann 03. mars 2006

Kristin Balle

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 3061,** Sp/f 75, 100 Tórshavn.
**Stjórn:** Farin frá sum stjóri: Ingun Ósk Eiriksdóttir, Klokkaragøta 10, 100 Tórshavn

Skráseting Føroya
tann 03. mars 2006

Kristin Balle

*Gravarhjálp*

*Marknagilsvegur 86 · 100 Tórshavn*
*Tel 311723 - 511723 · Fax 321722*
*herman@post.olivant.fo*

**Vit útinna allar uppgávur í sambandi við eina jarðarferð frá byrjan til enda**

- Eisini sangir, blómur og kransar
- Vit syrgja fyri sangarum *(í Tórshavn)*
- Vit framleiða okkara egnu kistur *(veita um alt landið)*
- Skipa fyri líkflutningi til og úr Føroyum
- Skipa fyri líkbrenning
- Hjá okkum kanst tú bestemma **tín síðsta vilja**

Sosialurin 341800

Sosialurin
Sosialurin
i